# Hølir í Saltangará til leigu

Hølir við Heiðavegin í Saltangará eru til leigu. Vælegnað til skrivstovur.

Samlaða gólvvíddin er 150 $m^2$ í tveimum hæddum.

Nýtt teldukervi er til allan bygningin.

Til ber at leiga øll húsini ella at leiga einstøk hølir við atgongd til hentleikarnar í húsinum.

Áhugaði kunnu síggja hølini við at venda sær til:

**tlf. 58 08 34**

# Til sølu

Vegna konkursbúgv verða ymiskir lutir hervið lýstir til sølu, so sum fartelda, printari, vøruhillar, kassatól, kortterminalur, pylsugrill og annað.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Advokatskrivstovuna, Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, att: Jens Andrias Vinther, advokat, e-mail jav@jura.fo ella Birnu Joensen, e-mail bij@jura.fo

**Advokatskrivstovan**
**Fr. Petersensgøta 9**

# Listafelag Føroya framsýning og umrøða

Sunnudagin 25. juni kl. 17.00 umrøðir Inger Smærup Sørensen, listasøgufrøðingur, framsýningina hjá Zacharias Heinesen í listahøllini á skipasmiðjuni í Havn. Allir limir felagsins eru vælkomnir.

**Listafelag Føroya**



# LOYSNIN!

**...ein lykil til alt húsið, virkið ella skúlan !!**

**Vit loysa lás- og lyklatrupulleikar.**

**Vit eru serkønir í at gera:**

Ruko systemlás · Skipan av lásum
Umvælingar · Skera lyklar til · Umskipa

**TÓRSHAVNAR LÁSASERVICE**
v/Jahn Petersen
TEL 310 411 · FARTEL 215 411
teldupostur: lasasmid@post.olivant.fo

## Heimarøktin øki 5 – Suðuroy

**Almanna- og Heilsumálastýrið hevur avgjørt at seta í verk eina royndarskipan við koyrandi náttarvakt í Suðuroy.**

Søkt verður eftir sjúkrarøktarfrøðingum, at arbeiða í skiftandi vaktum, skjótast gjørligt.
Ábyrgdarøki er heimabúgvandi fólk og tey ið búgva á eldrasambýlunum í oynni.

**Vit sóknast eftir røktarstarvsfólki sum við røktarfakligum royndum**
- hevur evni at arbeiða sjálvstøðugt við ábyrgd
- er før/ur fyri at loysa bráfengis uppgávur
- hevur góð samstarvsevni
- er før/ur fyri at arbeiða undir skiftandi umstøðum
- hevur koyrikort til persónbil

**Vit bjóða:**
- eitt starv við møguleika at menna starvs innihaldi
- eitt spennandi arbeiðspláss við nógvum røktarfakligum uppgávum
- eitt gott arbeiðsumhvørvi

Starvið er tíðaravmarkað til 31. desember 2006 tá skipanin verður eftirmett.

**Lønar og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar

**Umsóknarfeist** 7. juli 2006

## Fast Starv

# Heilsurøktari

Søkt verður eftir heilsurøktara frá 1. septermber 2006, at arbeiða 32 tímar um vikuna í skiftandi vaktum.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Almanna- og Heilsurøktarfelagið.

**Umsóknarfreist:** 1. august 2006

Um tú ynskir at vita meir um størvini, ert tú vælkomin at ringja til: økisskrivstovuna, tlf. 373907

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til:

**Heimarøktin, øki 5**
900 Vágur

## BILFØRARI

**Bilførari við stóra koyrikortinum søkist at byrja skjótast gjørligt til støðugt arbeiði.**

**HH TRANS**
**31 27 08**
**hhtrans@post.olivant.fo**

# Sosialráðgevi

## til sosialu deildina hjá Fuglafjarðar kommunu

Starvið sum sosialráðgevi á sosialu deildini hjá Fuglafjarðar kommunu verður hervið lýst leyst til setan í seinasta lagi 1. september 2006.

**Førleikakrøv:**
Kravt verður, at tú ert útbúgvin sum sosialráðgevi ella hevur aðra líknandi hægri útbúgving, hevur breiða vitan, góðan førleika at orða teg bæði munnliga og skrivliga, og at tú hevur evni til at arbeiða tvørfakligt. Tað er ein fyrimunur, um tú hevur royndir innan almenna fyrisiting, góðan telduførleika á brúkarastøði, kunnleika til skrásetingararbeiði og góðan kunnleika í føroyskum máli.

**Arbeiðsøki:**
Tú kemur í tøttum samstarvi við leiðaran á deildini at taka tær av málsviðgerð av almannamálum, sum sambært lóggávu eru ella koma undir málsøki hjá kommununi, herundir málsviðgerð av barnaverndarmálum.

Tú kemur saman við leiðaranum at hava samskifti við almennar stovnar, skúla, dagstovn, frítíðarskúla, kommunalu dagrøktina, tannlækna, kommunulækna, heilsusystir, skúlaheilsusystir, umsorganaranarbeiði vm.

Harumframt verður tú eisini við til at byggja sosialu deildina upp, so henda kann verða førleikament á nøktandi hátt.

**Løn:** Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Starvsmannafelagið í 6. lønarflokki.

**Umsókn:**
Hevur starvið tín áhuga, send so skrivliga umsókn saman við prógvum og viðmælum til Fuglafjarðar kommunu, Postboks 30, 530 Fuglafjørður.

Umsóknin skal verða kommununi í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 30. juni 2006 kl. 15.00.

Nærri upplýsningarum um starvið fáast við at venda sær til Irenu Olsen, leiðara á sosialu deildini á telefon 445.006 ella 210.806.

Fuglafjørður, tann 22. mei 2006

**Fuglafjarðar kommuna**

**Almannamálaráðið og heilsumálaráðið**

# Løgfrøðingur til Almanna- og heilsumálaráðið

Eitt starv sum løgfrøðingur í Almanna– og heilsumálaráðnum er leyst at søkja. Umsóknarfreistin er 17. juli 2006. Nærri fæst at vita um starvið, við at fara inn á heimasíðu okkara: www.ahr.fo, har nágreinilig lýsing stendur.